# Restaurant Kaggin

Fríggja- og leygarkvøldið 23. & 24. juni

**Meðan vit bíða:**
Salatborð v/ skeljadjórum

**Høvuðsverði:**
Kagga Búffur
v/ bakaðum epli ella pommes frites, fnískum grønmeti og whiskysós ella rómasós
Pipar Búffur
v/ bakaðum epli ella pommes frites og piparsós
Svínalundir
smáum pannustoktum eplum, grønmeti, champignon a la creme ella rómasós

**Omaná:**
Ísur við frukt

3 rættir einans 170,-

Borðbílegging á tel. 214170 ella 314170

Sosialurin - 311820


# Deildarleiðari í Runavík

Av tí at núverandi leiðarin fer frá vegna aldur, søkja vit eftir deildarleiðara til avgreiðsluna og pakkhúsið hjá Skipafelagnum Føroyar í Runavík.

**Arbeiðið**
Tú skalt hava ábyrgdina av arbeiðinum í pakkhúsinum og á avgreiðsluni. Fyrra helvt av vikuni fer í høvuðsheitum til lossing og útkoyring av vøru, og seinna helvtin fer til móttøku og lasting av fiski.



**Persónslýsing**
- Tú hevur leiðaraevnir
- Tú ert fyrikomandi
- Kundavinarligur
- Búgvin, men kanst saktans vera ungur
- Tú skalt ikki aftra teg við at taka lut í øllum arbeiði.

**Tínar royndir**
Starvið passar væl til ein persón, sum hevur roynt seg sum leiðara. Best er, um tú hevur skipsføraraútbúgving ella aðra hægri útbúgving.
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir at arbeiða við teldum. Ynskiligt er, at tú hevur kunnleika til vinnulívið í oynni.

**Tú fært**
Tú fært eitt áhugavert starv við fjølbroyttum arbeiði, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

Lønin verður eftir avtalu.

**Send tína umsókn**
Um hetta starv hevur tín áhuga, so send okkum eina umsókn við tínum CV, prógvum o.ø. skjótast gjørligt, og áðrenn mánadagin 26. juni.
Skriva til Skipafelagið Føroyar, Eystara Bryggja, P. O. Boks 47, 110 Tórshavn, att.: Viggo Dam, tlf. 311225.
Hevur tú spurningar viðv. arbeiðnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Viggo Dam.

Skipafelagið Føroyar

*Skipafelagið Føroyar varð stovnað í 1919 og er størsta føroyska flutningsfelagið. Skipafelagið Føroyar hevur skip í linjufarti millum Føroyar, Skotland og Danmark. Meginparturin á føroyskum inn- og útflutningi verður fluttur á okkara skipum. Skipafelagið Føroyar veitir eisini aðrar tænastur, sum t.d. agency og hurð-til-hurð tænastu.*

# Starv sum góðskuleiðari

Fyri framhaldandi at vera við í menningini av okkara framleiðslu og brynja okkum til stóru avbjóðingarnar, sum eru fyri framman, verður søkt eftir einum góðskuleiðara.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi og áhugavert starv sum góðskuleiðari fyri Havsbrún. Eitt starv við nógvum avbjóðingum í vinnugreinum, sum eru í støðugum vøkstri og broytingum. Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú kemur at taka lut í og leggja tilrættis góðskustýringina og dokumentatiónina av framleiðsluni frá rávørum til lidnar vørur.

**Tað er ein fyritreyt, at tú:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.
- Ert tolin, men samstundis ágrýtin.
- Hevur ein ávísan teldukunnleika, dugir væl at samskifta, bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Útbúgving:**
Vit kundu hugsa okkum, at tú hevur eina holla útbúgving, sum gevur tær kunnleika til framleiðslu, kemi, biologi og mikrobiologi.

**Byrjunartíð**
1. september, men vit kunnu bíða nakað eftir rætta fólkinum.

**Løn:**
Sambært avtalu.

**Eitt sindur um Havsbrún:**
Havsbrún er eitt av størstu virkjunum í Føroyum og hevur 35 ár á baki. Á Havsbrún eru tríggjar deildir: Mjøldeildin framleiðir mjøl og lýsi burturúr fóðurfiski og slógvi. Fóðurdeildin framleiðir fiskafóður. Pelagos heilfrystir pelagiskan fisk. Havsbrún hevur ein umsetning uppá uml. 300 mill. kr, harav helvtin er útflutningur. Umleid 100 ársverk eru á virkinum.

Hevur tú hug, áræði, og sært teg føran fyri at røkja hetta starv, ert tú vælkomin at søkja.
Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera Havsbrún í hendi í seinasta lagi 24. juli.

Nærri upplysningar um starvið kunnu fáast við at ringja til Havsbrún, og spyrja eftir Jústines ella Pól.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
Box 81
FO-530 Fuglafjørdur
Tlf.: 44 41 60
Fax 44 44 00
Email:bep@havsbrun.fo

Sosialurin - 311820


# Frá 1000 ára haldinum

1000 ára haldið

www.tusund.fo

Í sambandi vi› Jóansøkuna ver›ur frams‡ningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti, í skúlanum í Vági frá 23.–30. juni, um kirkjurnar í Føroyum.

RZ017



**Vit bjóða breitt úrval av inventar til:**
- Goymslur
- Arkiv
- Vørubilar
- Arbeiðsrúm

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



**Hevur tú ikki fingið**
Tíðindablaðið
sosialin

Vit gera alt, hvat vit kunnu, fyri at haldarar fáa leygardagsblaðið til tíðina. Men villur kunnu koma fyri, og um tú ikki hevur fingið blaðið fríggjakvøldið, ring so tel. 21 12 01, so vit kunnu syrgja fyri, at tú fært blaðið

Tíðindablaðið sosialurin


## Starv

### DEKKARI

Strandfaraskip Landsins arbeiðir í løtuni við at seta Ternuna I í sigling uppá Skálafjørðin, og í tí sambandinum er eitt fyribilsstarv sum dekkari við Ternuni I leyst at seta skjótast gjørligt og fram til endan av september í ár.

Farleiðin hjá Ternuni I er Strendur-Toftir-Tórshavn, og siglt verður tríggjar túrar dagliga frá mánadegi til fríggjadag. Arbeiðstíðin er í miðal 42 tímar um vikuna.

Leygardag og sunnudag er eingin sigling.

Við Ternuni I eru skipari, stýrimaður, maskinmeistari og ein dekkari.

Skipið liggur á Strondum um náttina, og umstøður eru at búgva umborð..

**Førleikakrøv**
- Ófulltikin matrósur
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Sjón- og hoyrnarroynd, ikki eldri enn 3 ár
- Roykkavaraaprógv, ikki eldri enn 5 ár

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Og skulu vera fyritøkuni í hendi skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Páll Heinesen á tlf. 34 30 00 ella e-post: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

## Starv

### MASKINMEISTARI

Strandfaraskip Landsins arbeiðir í løtuni við at seta Ternuna I í sigling uppá Skálafjørðin, og í tí sambandinum er eitt fyribilsstarv sum maskinmeistari við Ternuni I leyst at seta skjótast gjørligt og fram til endan av september í ár.

Farleiðin hjá Ternuni I er Strendur-Toftir-Tórshavn, og siglt verður tríggjar túrar dagliga frá mánadegi til fríggjadag. Arbeiðstíðin er í miðal 42 tímar um vikuna.

Leygardag og sunnudag er eingin sigling.

Við Ternuni I eru skipari, stýrimaður, maskinmeistari og ein dekkari.

Skipið liggur á Strondum um náttina, og umstøður eru at búgva umborð.

Høvuðsmotorurin á Ternuni I er ein Deutz 750 hk.

**Førleikakrøv**
- Motorpassari
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Roykkavaraaprógv, ikki eldri enn 5 ár

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Og skulu vera fyritøkuni í hendi skjótast gjørligt

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Páll Heinesen á tlf. 34 30 00 ella e-post: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarðin við Velbastaðvegin vegna barnsburðarfarloyvi 30 tímar (evt. 40 t.) um vikuna, at byrja 14. aug. 2000 til 12. febr. 2001.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3–7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 3. juli kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO 100 Tórshavn


**PLAST**
**VINDEYGU og- HURÐAR**
**á GOYMSLU**



eisini útgangand vindeygu

FØROYSK FRAMLEIÐSLA

team 85 • 31 65 11

ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F
www.plastvirki.fo

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta


# Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærara til 12 tímar um vikuna til tíðaravmarkað starv við Haldórsvíkar Skúla fyri skúlaárið 2000/2001.

Tann, ið kann undirvísa í tilevning, smíð og svimjing við gentum, hevur fyrimun.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. juli.

**Haldarsvíkar Skúlanevnd**
v/ Tórhild Hansen
438 Langasandur


**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**

SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

Tlf. 32 22 22



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**